FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Deildin fyri Heilsu- og Sjúkrarøktarvísindi

Kunning um skeiðið Klinisk vegleiðaraútbúgving

Undirvísingin er skipað við einari blanding av ástøðiligum uppleggum og kjakum/venjingum í smáum bólkum. Tú kemur at fáa tað nýggjastu vitanina um kliniska vegleiðing, og tú kemur at venja hegni í at virka sum kliniskur vegleiðari í kliniskari praksis.

Tað er 80% kravd uppmøting til allar undirvísingardagar - sí undirvísingaryvirlit niðanfyri. Undirvísingin er oftast millum kl. 9.00 – 15.00.

Kliniska vegleiðaraútbúgvingin er 10 ECTS, og hettar svarar til eina lestrarorku uppá umleið 300 tímar.

Skeiðið endar við einari skrivligari prógvtøku, sum verður skrivað í bólki.

Málbólkurin fyri skeiðið er heilsustarvsfólk á bachelor stigi; so sum sjúkrarøktarfrøðingar, ergoterapeutar, fysioterapeutar og ljósmøður.

Tað er plass fyri 24 luttakarum, og sjúkrarøktarfrøðingar hava framíhjárætt til skeiðið. Tað vil eisini vera ávís klinisk økir, sum mangla kliniskar vegleiðarar, sum fáa framíhjárætt.

Kostnaður fyri skeiðið er 8.000 kr

Ætlanin er at hava skeiðið Klinisk vegleiðaraútbúgving hvørt ár.